SPEKT | løggildir grannskoðarar

ARKIV

Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur 2010

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands

Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sprl. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	2
Ársfrágreiðing	4
Roknskaparátekning leiðslunnar	7
Átekning frá óheftum grannskoðara	8
Nýttar roknskaparreglur	9
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2010	11
Fíggjarstøða 31. desember 2010	12
Notur	14

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon: 35 35 80
Telefaks: 35 35 81

Roknskaparár nr. 4

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:	Varalimir:
Elisabeth Eldevig, forkvinna *búskaparfrøðingur*	Katrina Maria Johannesen *løgfrøðingur*
Bjørn á Heygnum, næstformaður *advokatur*	Óluva J. Midjord *yrkislærd búnaðarkvinna*
Niels Th. Pedersen *maskinmeistari*	Heðin D. Poulsen *løgfrøðingur*
Marion á Lakjuni *cand.polit.*	Jónfinn Thomsen *advokatur*
Anna Rubeksen *bóndi*	Sigert Patursson *bóndi*

Stjórn

Sjúrður Knudsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar

Bank Nordik
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Landsbankin
Jyske Bank
Skandinaviska Enskilda Banken

Ársfrágreiðing

Virksemi

Endamál Búnaðargrunnsins er at veita lán til landbúnaðin og at figgja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna), sambært løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 30. apríl 2007.

Herumframt umsitur grunnurin festikontur og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslitið

Inntøkurnar í 2010 eru 9.225 tkr. móti 12.432 tkr. árið fyri, og er hetta ein lækking uppá 3.207 tkr. Rentuinntøkur av útlánum vóru 4.892 tkr., av lánsbrøvum og avtaluinnlánum 3.491 tkr. og av innistandandi 489 tkr.

Samlaða lækkingin stavar í høvuðsheitinum frá lánsbrøvum og avtaluinnlánum. Eisini er ein minking í rentuinntøkum av innistandandi peningi og ein vøkstur í rentuinntøkum av útlánum. Meira um hetta longur niðri á síðuni.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hækkaðu við 279 tkr. úr 5.715 tkr. í 2009 til 5.994 tkr. í 2010. Hetta stavar m.a. frá, at umsitingin er hækkað við 72 tkr., húsaraksturin er lækkaður við 23 tkr. og innbúgv við 18 tkr. Lønirnar eru hækkaðar við 109 tkr. og kemst hetta av nátúrligum hækkingum.

Raksturin av Búnaðarstovuni (jarðarfyrisitingini) er hækkaður við 148 tkr. úr 2.671 tkr. til 2.819 tkr.

Úrslitið aftaná avskrivingar og avsetingar móti tapi upp á skuldarar er 871 tkr. í 2010 móti 2.110 tkr. í 2009. Hetta stavar frá omanfyrinevndu broytingum, umframt avsetingum móti tapi upp á 2.361 tkr.

Útlánini eru lækkað við 1.329 tkr. úr 99.051 tkr. til 97.722 tkr. og kemur hetta av hækking í útlánum upp á 1.036 tkr. minus avsetingar upp á 2.361 tkr. umframt eini lítlari broyting í fallnari festi- og traðarleigu upp á 4 tkr.

Viðvíkjandi lánsbrøvum og avtaluinnlánum, má samanumtikið sigast, at tað hevur verið ein góð loysn at keypa lánsbrøv, bæði tá hugsað verður um avkast og trygt.

Niðanfyri eru talvur, sum vísa gongdina á lánsbrøvum frá byrjan í 2001 til ultimo 2010.



	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	Miðal
Ognarrøkt	5,80%	6,93%	4,30%	3,10%	3,00%	3,00%	3,60%	-0,06%	5,11%	2,02%	3,68%
EFFAS 1-5	5,80%	7,00%	4,21%	4,50%	2,87%	0,74%	3,22%	3,19%	4,26%	4,11%	3,99%
Innlán	3,60%	2,95%	2,15%	2,15%	2,40%	3,19%	4,27%	4,81%	1,84%	1,05%	2,84%



	Byrjan	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010
Ognarrøkt	100,00	105,80	113,13	117,99	121,65	125,30	129,08	133,70	133,62	140,45	143,29
EFFAS 1-5	100,00	105,80	113,21	117,97	123,28	126,82	127,76	131,87	136,08	141,87	147,71
Innlán	100,00	103,60	106,66	108,95	111,29	113,96	117,60	122,62	128,52	130,88	132,26

- Innlán (grønur litur) svarar til at peningurin varð settur á innlánskontur, við hægst møguligari rentu til eina og hvørja tíð, ella tað sum eisini kallast DK Repo renta.
- Effas 1 – 5 (reyður litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum okkara íløgur í lánsbrøv vera samanhildin við.
- Ognarrøkt (bláur litur) eru lánsbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir rentuna p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2010 og miðal rentuna fyri sama tíðarskeið. DK Repo rentan hevur í miðal givið 2,84% meðan lánsbrøvini hava givið 3,68% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av hvussu nógvar krónur hvørt lánsbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2010. T.v.s. at lánsbrøvini hava givið 43,29 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo hevði givið 32,26 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Tøkur peningur er lækkaður við 104.855 tkr. úr 140.656 tkr. í 2009 til 35.802 tkr. í 2010. Hetta stavar m.a. frá inngjøldum fyri sølu av jørð upp á 4.577 tkr. og av at íløgurnar í lánsbrøv eru hækkaðar við 110.959 tkr., meðan innlánini eru lækkaði við 104.854 tkr. eftir at bankapakki 1 er settur úr gildi.

Grunnurin er vaksin úr 113,2 mió. kr. til 114,1 mió. kr. Hetta kemur av rakstraravlopinum.

Festikontan er vaksin úr 193,7 mió. kr. til 197,7 mió. kr. Hækkingin stavar fyri størsta partin frá jarðarsølu. Her skal viðmerkjast, at týðandi upphæddir eru játtaðar av festikonto og vera útgoldnar fyri íløgur, sum eru í gerð í løtuni hjá festarum.

Viðmerkjast skal, at av nevndu 197,7 mió. kr. hoyra 11,3 mió. kr. til konto fyri mist vetrarbit. Eisini skal viðmerkjast, at lógin fyri vetrarbit er broytt í mai 2009, soleiðis at mist bit fyri ognarhagar ikki longur verður goldið á konto í Búnaðargrunninum, men beinleiðis til eigaran. Eisini er lógin broytt soleiðis, at tann parturin, sum hoyrir til landsjørð, hevur fingið aðrar treytir fyri at fáa pening útgoldnan.

Hendan lógarbroyting kemur at hava við sær, at tað ikki verður goldin eins nógvur peningur á konto í Búnaðargrunninum fyri mist vetrarbit í framtíðini, sum undanfarin ár. Roknast kann eisini við størri útgjaldingum av konto fyri mist vetrarbit komandi árini.

Í mai 2011, er lógin fyri Búnaðargrunnin broytt. Størsta broytingin er tann, at helvtin av tí, sum stendur á festikonto, verður flutt í eina felags festipulju, sum so allir festarar kunnu søkja fígging av. Eisini fáa onnur enn festarar møguleikan at søkja av felagspuljuni eftir ávísum treytum.

Mett verður, at hendan broytingin í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni, vit tað at eisini festarar í útjagaranum, har ikki er serliga nógv á festikonto, eisini fáa møguleikan at søkja um fígging av felagspuljuni.

Peningaviðurskifti:

Fíggjarjavnin er 314.820 tkr. Av hesum er eginpeningurin 311.870 tkr., sum svarar til 99,1%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri 2010.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætt-vísandi mynd.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn, hin 6. juli 2011

Stjórn:

Sjúrður Knudsen

Stýrið:

Elisabeth Eldevig
forkvinna

Óluva J. Midjord

Heðin D. Poulsen

Marion á Lakjuni

Anna Rubeksen

Góðkendur á fundi stýrisins, hin / 2011

Fundarstjóri:

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2010 við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, figgjarstøðu og notum.

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglurnar. Henda ábyrgd ber í sær, at grunnurin støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttar verða hóskandi roknskaparreglur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparreglurnar, sum leiðslan nýtir, eru hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og figgjarligu støðu 31. desember 2010 og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2010 samsvarandi nýttu roknskaparreglunum.

Tórshavn, hin 6. juli 2011
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin er, eins og undanfarna ár, gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum eru lýstar niðanfyri.

Um innroknan og virðisáseting í ársroknskapinum

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostpris. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Rentur av lánsbrøvum verða tíðargreinaðar til við roknskaparárslok.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán og eftirstøður verða upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskriving ímóti tapi. Upphæddirnar verða mettar hvør sær.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi.

Lánsbrøv

Lánsbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Nýttar roknskaparreglur

Skuld

Skuld verður upptikin til áljóðandi virði.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2010

	Nota	2010	2009
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	145.663	158.769
Rentuinntøkur v.m.	2	8.872.066	12.007.514
Sakarmálsgjøld		207.743	265.941
Inntøkur til samans		9.225.472	12.432.224
Umsiting	3	-748.486	-676.289
Húsarakstur	4	-185.190	-208.683
Starvsfólkaútreiðslur	5	-2.221.739	-2.112.347
Innbúgv v.m.	6	-9.690	-27.320
Annað	7	-9.593	-20.000
Búnaðarstovan		-2.818.926	-2.670.687
Úrslit áðrenn avsetingar		3.231.848	6.716.898
Javning í avseting til tap upp á skuldarar		-2.360.855	-4.606.900
Ársúrslit		870.993	2.109.998

Fíggjarstøða 31. desember 2010

	Nota	2010	2009
		kr.	kr.
OGN			
Ogn í umferð			
Áogn			
Útlán og eftirstøður	8	97.721.733	99.050.764
Onnur áogn	9	496.036	270.792
		98.217.769	99.321.556
Lánsbrøv		180.800.688	69.842.007
Tøkur peningur	10	35.801.877	140.656.452
Ogn í umferð til samans		314.820.334	309.820.015
OGN TIL SAMANS		314.820.334	309.820.015

Fíggjarstøða 31. desember 2010

	Nota	2010	2009
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginpeningur			
Grunnurin	11	114.114.782	113.243.789
Festikontur	12	197.738.110	193.699.991
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.803
Eginpeningur til samans		311.869.695	306.960.583
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Onnur skuld	13	2.950.639	2.859.432
Skuld til samans		2.950.639	2.859.432
SKYLDUR TIL SAMANS		314.820.334	309.820.015
Eventualskyldur og veðsetingar	14		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2010	2009
	kr.	kr.
Festileiga	27.830	26.852
Traðarleiga	107.733	103.917
Festigjøld við skifti	10.100	28.000
	145.663	158.769

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	3.624.717	3.407.020
Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum	3.491.488	2.414.609
Rentur av avtaluinnláni	0	4.003.518
Rentur av innistandandi peningi o.a.	488.678	1.005.141
Rentur av eftirstøðum	1.267.183	1.177.226
	8.872.066	12.007.514

3 Umsiting

Veðhavaralýsingar	-800	-1.600
Løgfrøðilig hjálp	246.100	176.132
Serkøn hjálp	37.400	5.760
Innheintingarkostnaður	10.741	2.149
Postgjald	17.561	17.688
Grannskoðan	76.500	72.000
Roknskaparhjálp v.m.	17.500	16.600
Trygging	17.915	24.271
Tinglesing	-46.800	88.800
Ymiskt	37.043	66.422
Námsferðir	20.562	0
Edv-útreiðslur	63.812	47.555
Bókaútgáva	75.144	-1.358
Telefon	50.009	32.570
Internet	26.987	37.560
Haldaragjald, bløð o.a.	21.538	21.885
Framtíðarlandbúnaður	0	0
Serkøn hjálp - Landbofyn	0	0
Aðrar skrivstovuútreiðslur	77.274	69.855
	748.486	676.289

Notur

4 Húsarakstur

	2010	2009
	kr.	kr.
Viðlíkahald	0	1.855
Reingerð o.a.	61.620	72.700
Ljós og hiti	36.143	35.509
Urtagarðurin	44.864	70.851
Kavarudding v.m.	3.240	3.120
Umbygging av skrivstovuni	14.500	4.352
Ávaringarskipan	14.810	14.400
Húsavarðatænastan	10.013	5.896
	185.190	208.683

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	1.589.690	1.524.262
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	30.112	32.496
Arbeiðsloysistrygging	18.279	18.569
Barsilsskipanin	11.285	11.467
Eftirlønargjald	229.121	207.296
Lønir og lønargjøld til samans	1.878.487	1.794.090
Dagpeningur, Stýrið	317.055	303.370
Ferðapeningur, Stýrið	26.197	14.887
	2.221.739	2.112.347

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	9.690	27.320
	9.690	27.320

7 Annað

Skeið og landbúnaðartiltøk	9.593	20.000
	9.593	20.000

Notur

8 Útlán og eftirstøður

	2010	2009
	kr.	kr.
Ymiskar útlánskontur	118.287.553	119.447.655
Avdráttir og rentur, fallið til gjaldingar	37.365.180	35.168.836
Fallin festi- og traðarleiga	55.755	60.173
Avsett til tap	-57.986.755	-55.625.900
	97.721.733	99.050.764

9 Onnur áogn

Mvg-áogn	444.410	109.007
Onnur áogn	51.625	161.785
	496.035	270.792

10 Tøkur peningur

Kassapeningur	300	307
Bank Nordik	27.102.193	82.833.057
Eik Banki	791.276	46.516.941
Suðuroyar Sparikassi	382.931	239.942
Norðoya Sparikassi	282.141	4.663.112
Landsbankin	5.700.197	5.525.189
Jyske Bank	162.332	584.101
Skandinaviska Enskilda Banken	748.860	0
Postgiro	631.647	293.803
	35.801.877	140.656.452

11 Grunnurin

Salda 1. januar	113.243.789	111.133.791
Rakstraravlop	870.993	2.109.998
	114.114.782	113.243.789

Notur

12 Festikontur

	2010	2009
	kr.	kr.
Salda 1. januar	193.699.991	184.409.939
Søla av jørð	4.577.288	7.850.716
Inngoldið fyri vetrarbit	186.566	288.467
Inngoldið fyri vetrarfriðing	0	0
Inntøka av grótbrotum	457.939	1.070.606
Frábýtisútreiðslur	0	0
Leiga	549.134	544.742
Alistøðir	132.276	404.327
Endurgjald frá Landsverkfrøðinginum	96.800	223.901
Annað endurgjald	103.750	132.000
	199.803.744	194.924.698
Útgoldið, netto	-2.065.634	-1.224.707
Festikontur 31. desember	197.738.110	193.699.991
Ikki sundurgreinað inngjøld	0	0
	197.738.110	193.699.991

13 Onnur skuld

Skyldugar útreiðslur – Búnaðarstovan	2.818.903	2.727.696
Studningur samlikonta	53	53
Skyldugar útreiðslur – Føroya Gjaldstova	131.683	131.683
	2.950.639	2.859.432

14 Eventualskyldur og veðsetingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.